Jytte Joensen fekk herðaklappið:

# Ein heiður og ein viðurkenning


*Jytte Joensen*

Fyri 6. ferð í 7 ár var einum persóni veitt ”Herðaklappið”, ið verður latið fyri serlig avrik í farna ári føroyskum áhugaleiki at frama. Hesaferð var tað Jytte Joensen, ið fekk hendan heiður fyri leiklut sín sum Edith Piaff, eitt megnaravrik innan føroyskan áhugaleik. Fyrstu árini var tað Leikpallur Føroya, ið lat herðaklappið, men eftir at einki slíkt varð latið í 2005, var avrátt, at Tjóðpallur Føroya og MáF í felag skuldu standa fyri at lata hesa viðurkenning.

Um nevnt var heiðurin sýndur Jytte hesaferð, men hon er so nógv annað og meiri enn ”bert” ein áhugaleikari.

Tað er altíð fløvandi at kenna, at tað, ein fæst við, verður viðurkent av øðrum. Eitt upplyftandi og viðurkennandi orð fløvar í gerandisdegnum, og tá so talan er um eina almenna viðurkenning sum ”Herðaklappið”, kennist tað sum ein serligur heiður.

Tað metir Jytte Joensen, ið gjørdist vælunti móttakarin av heiðrinum hesaferð.

”Tað kennist ógvuliga gott at fáa viðurkenning fyri tað arbeiði, tú ger innan føroyskan áhugaleik, og eg taki tað sum ein stóran heiður, at nevndin hesaferð valdi meg”, sigur Jytte.

Tað er fyri leiklutin sum Edith Piaff í leikinum av sama navni um navnframa franska songfuglin – millum manna nevnd spurvurin - at Jytte fær hesa viðurkenning, men hesin leiklutur er langtfrá einasta íkast, Jytte hevur lagt eftir seg innan føroyskan áhugaleik, og hon er enn mitt í sínum longu higartil langa virki innan froyska leiklist.

Tí skal sannleikin fram – og tað skal hann – so hevur Jytte verið minst líka dúgv aftan leiktjaldið sum á palli. Og tað er avgjørt ikki av tilvild, at tað var Jytte sjálv, ið syrgdi fyri umsetingini av teimum 14 sangunum í leikinum Edith Piaff – úr upprunamálinum fronskum, enntá.

### Drúgv á palli

Tað er fyri ein leiklut, at Jytte Joensen nú sum ein av fáu føroyingunum kann prýða seg við heiðinum ”Herðaklappið”, og hon er heldur ikki á nakran hátt óvon við at standa á palli.

Longu í 70-árunum kveiktist áhugin fyri leiklistini, og tað var eitt skeið, ið navnframi Eyðun Johannesen skipaði fyri, og sum Jytte tók lut í, ið veruliga setti ferð á hennara lívsleið innan leiklistina. ”Skipið” eftir Steinbjørn Jacobsen var fyrsti veruligi leikur, Jytte var við í, men í hesum tíðarskeiði var hon javnur luttakari í kendu Studentarkabarettunum.

”So kom eitt deytt tíðarskeið, meðan eg læs niðri og fekk børn samstundis. Men tá eg kom heim aftur í 1990 fór eg aftur upp í sjónleikaralívið og var við í fleiri leikum. Serliga kann eg nevna ”Dansur í fyllandi sól”, sum var ein ógvuliga stór uppseting, og ”Ferðin til teir grønu skuggarnar”, sum var ein einmans leikur, og tískil serliga avbjóðandi.

Annars kunnu nevnast leikir sum ”Óvitar”, ”Ísblomstrið” og ”Pippi”, har hon eisini hevur leikt við.

### Betri kor ynskilig

Jytte Joensen hevur sum omanfyri nevnt týtt sangirnar til leikin um Edith Piaff, men tað er ikki einasta ferðin, hon hevur roynt seg sum týðara.

”Nei, eg havi eisini týtt ein leik, sum Havnar Sjónleikarafelag setti upp. Tað var leikurin ”Ísbjarnirnar”. Og so havi eg eisini roynt meg sum leikstjóra, eitt nú við tiltakinum ”Kabaret Óli P. ár 2000 á veg” umframt aðrar smærri uppsetingar.

Men ikki minst man Jytte vera kend fyri sítt ótroyttiliga og drúgva arbeiði sum nevndarlimur í Havnar Sjónleikarafelag. Har hevur hon sitið í nevnd seinastu 10 árini, tey seinastu 4 sum formaður, ein postur, hon situr á enn.

Og tað gerst bara tyngri og tyngri at reka eitt slíkt felag so hvørt sum kappingin frá serliga sjónvarpinum gerst harðari og harðari, samstundis sum krøvini frá áskoðarunum til leikdygd og professionalismu økist.

”Tað kundi verið ynskiligt, at leiklist í síni heild hevði betri kor at virka undir – serliga fíggjarliga. Reinur áhugaleikur er mest sum bert ein viðfáningur í dag, tí alt kostar. Um leikararnir sjálvir ikki í so stóran mun verða løntir, so kostar alt uttanum, tað veri seg pallsmíð og tøkni m.a.”, sigur Jytte Joensen.

So alt meðan kravt verður meiri av fólki fyri minni, verður truplari og truplari at fáa inntøkur at dekka útreiðslur í føroyskum sjónleiki. Og flestu leikir eru so tíðar- og orkukrevjandi, at neyðugt er við løntum fólki, í hvussu er til høvuðsleiklutirnar.

Býráðið er høvuðsstuðul hjá Havnar Sjónleikarafelag, og tann stuðulin kemur sjálvsagt væl við. Men tað hevði verið ynskiligt, at landið í størri mun viðurkendi tað megnar arbeiði, sum brennandi eldsálir runt um í landinum gera fyri føroyska leiklist á øllum stigum.

Ein silvurgríma, ein nál, eitt skreytblað og og kekkur áljóðandi 12.000 kr. til uttanlandsferð at nema sær kunning um sjónleik, eru ítøkiligu lutirnir í sambandi við ”Herðaklappið”. Men einki er at ivast í, at sjálvur heiðurin er tað, ið fløvar allarmest – og eisini verður tað, sum fer at standa eftir í sjónleikarasøguni.